# Viðtøkur fyri Tórshavnar Ungdómsráð

## Felagið – §1

1. Navn ráðsins er Tórshavnar Ungdómsráð, stytt TUR, og heimstaður ráðsins er Tórshavnar Kommuna.

## Endamál – §2

1. Tórshavnar Ungdómsráð er málgagn ungdómsins í Tórshavnar kommunu. Ráðið fær í lag samskifti við kommunustýrið um mál, ið viðvíkja ungdóminum.
2. Tórshavnar Ungdómsráð verður kunnað um tiltøk, sum hava týdning fyri ungdómin, og eigur at samstarva við kommunustýrið fyri at tryggja, at atlit verður tikið at ynski og tørvi ungdómsins.
3. Ráðið skal koma við uppskotum og hugskotum um betran av korum og trivnaði teirra ungu og tryggja, at hugflog og eldhugi teirra ungu verða virðismett og gagnnýtt.

## Heimild – §3

1. Tórshavnar Ungdómsráð umboðar mótvegis kommunustýrinum ungdómin í ungdómspolitiskum spurningum, og virkar sum eitt samskiftislið millum borgarar og kommunustýrið í sambandi við skipan av ungdómspolitikkinum.
2. Tórshavnar Ungdómsráð hevur hoyringar- og útsagnarrætt í ungdómspolitiskum málum og málum annars, ið viðkoma ungum í kommununi. Tórshavnar Ungdómsráð hevur rætt at koma við hugskotum og vegleiðingum til býráðið.
3. Kommunustýrið kann spyrja Tórshavnar Ungdómsráð um tað, ið viðvíkur teimum ungu.
4. Tórshavnar Ungdómsráð eigur í so stóran mun sum møguligt at vera umboðað í arbeiðsbólkum og nevndum, ið eru viðkomandi fyri ungdómin.
5. Einstøku kommununevndirnar samskifta við Tórshavnar Ungdómsráð í málum, sum hava við teirra málsøki at gera.
6. Tórshavnar Ungdómsráð eigur ikki at viðgera persónsmál.

## Starvsháttur – §4

1. Tórshavnar Ungdómsráð kunnar seg um ynski og tørv teirra ungu í kommununi umframt kommunurnar viðurskifti á ungdómsøkinum.
2. Tórshavnar Ungdómsráð skal virka fyri áhaldandi kunning til tey ungu um broytingar og nýskapan á ungdómsøkinum.
3. Tórshavnar Ungdómsráð skal halda fast um og menna samskiftið við kommunustýrið gjøgnum framhaldandi meting av tiltøkum á ungdómsøkinum, og harvið menna og laga tey til samsvarandi samfelagsmenningini.
4. Tórshavnar Ungdómsráð eigur at hoyra tær staðbundnu nevndirnar í ungdómspolitiskum málum.

## Samanseting – §5

1. Valdir verða 5 limir og 5 varalimir í Tórshavnar Ungdómsráð.
2. Tríggir teir fyrstvaldu varalimirnir kunnu eisini møta á øllum fundum hjá Tórshavnar Ungdómsráði.
3. Valskeiðið er tvey ár.
4. Limur í Tórshavnar Ungdómsráð kann sleppa undan limaskapi eftir áheitan. Avgerð um at limur verður frítikin, verður tikin av Tórshavnar Ungdómsráð.
5. Um ein limur í valskeiðnum missir valbæri, doyr ella verður frítikin sambært §5, stk. 4, kemur varalimur inn í tí raðfylgju, teir eru valdir.

## Val – §6

1. Val til ungdómsráðið verður hildið 2. hvørt ár.
2. Valbæri og atkvøðurætt hava øll ung í kommununi, ið á valdegnum eru millum 16 og 25 ára gomul.
3. Valevni, sum ynskja at stilla upp, geva skrivlig boð um hetta í seinasta lagið 4 vikur, áðrenn valið verður hildið. Saman við valevnisfráboðanini eigur at vera undirskrift hjá minst 5 stillarum, ið lúka treytirnar fyri valrætti til ungdómsráðið.
4. Bara valevni, ið rættstundis hava boðað frá, og sum rættstundis hava sent inn stillaralista, kunnu verða uppstillað.
5. Valið er talgilt. Tó kunnu aðrir valhættir takast í nýtslu, um semja er millum Tórshavnar Ungdómsráð og kommunustýrið um tað.
6. Kommunustýrið ásetir nærri reglur um valið, herundir um freistir, vallistar, atkvøðugreiðslu, kunngerð og uppgerð av valinum, klagur um valið v.m.

## Stovnan og arbeiðsháttur – §7

1. Tórshavnar Ungdómsráð skipar seg við forfólki, næstforfólki, kassameistara og skrivara á fyrsta fundi eftir valið.
2. Tórshavnar Ungdómsráð ásetir fundarskrá sína, hvussu ofta fundir verða hildnir, reglur fyri dagsskrá, fundarinnkalling og ráðsins arbeiðshátti.
3. Dagsskrá og fundarskrá skal sendast kommunustýrinum. Fundarfrásagnir eru almennar við virðing fyri tagnarskylduni.
4. Tað er sjálvboðið at vera limur í Tórshavnar Ungdómsráð, og tessvegna verður ikki latin samsýning fyri at sita í ráðnum. Tó kunnu limir fáa endurrindað skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Tórshavnar Ungdómsráð.
5. Kommunustýrið setir eina upphædd av á fíggjarætlanini til virksemi Tórshavnar Ungdómsráðs.
6. Kommunan veitir skrivstovuhøli, fundarhøli og skrivarahjálp til Tórshavnar Ungdómsráð.

### Gildiskoma – §8

1. Viðtøkurnar koma í gildi, tá tær eru samtyktar í kommunustýrinum.

### Broytingar í viðtøkum – §9

1. Tórshavnar Ungdómsráð ella ein meiriluti, kann koma við uppskoti til kommunustýrið um broytingar í viðtøkunum.
2. Kommunustýrið kann koma við uppskotið til broytingar í viðtøkunum.
3. Broytingarnar í viðtøkunum koma í gildi, tá ið tær eru samtyktar av kommunustýrinum.

### Avtøkam – §10

1. Kommunustýrið kann taka av Tórshavnar Ungdómsráð. Áðrenn tílík avgerð verður tikin, eigur málið í góðari tíð at vera latið ráðnum til ummælis.
2. Verður Tórshavnar Ungdómsráð tikið av, fella allar møguligar ognir v.m. til Tórshavnar kommunu.

*Soleiðis samtykt í Trivnaðarnevnd Tórshavnar Býráðs 27. november 2025.*